Nr. 33/2020

Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um teknmálstulkar, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hví verða tær sendingar, sum vanliga verða tulkaðar beinleiðis í Kvf, ikki tulkaðar í løtuni?
2. Hvussu verður tryggjað, at sendingar í sambandi við Kommunuvalið verða tulkaðar beinleiðis

Viðmerkingar:
Fleiri deyv hava gjørt vart við, at sendingar í Kvf, sum vanliga verða tulkaðar beinleiðis, í løtuni ikki verða tulkaðar, ella verða tulkaðar nakrar dagar seinni. Og fyri fyrstu ferð í 25 ár var ólavssøkan sett uttan deyvatulk.
Kommunuval verður í november, men tað kann verða trupult hjá deyvum at taka lut í okkara fólkaræði, um tey ikki fáa møguleika at fylgja við í almenna kjakinum.
Teknmál varð í 2017 viðurkent sum føroyskt mál, og eigur tí at verða viðgjørt á jøvnum føti við talumálið.

Á Løgtingi, 27. oktober 2020

Beinta Løwe Jacobsen